# Birgar við nýggjari bók

"Havnarmyndir - fyrr og nú" er heitið á nýggari bók hjá Birgari Johannessen, sum kemur út mikudagin 4. november. Í sambandi við at bókin kemur út verður móttøka fyri almenninginum í Sjónleikarhúsnum frá kl. 10-18, har bókin verður seld og signerað av høvundanum. Bókin verður eisini at fáa í bókahandlunum kring landið.

Á ólavsøku í ár hevði Birgar framsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Talan var um eina framsýning við gomlum fotomyndum og nýggjum myndum, ið eru tiknar úr sama staði sum tær gomlu. Tí vórðu nógvar samanberingar gjørdar á framsýningini um tann gamla og nýggja býin.

Birgar sigur, at framsýningin varð stak væl vitjað. Fleiri heittu á seg um ikki at leggja hetta søguliga myndatilfar til síðis, men heldur geva tað út í bók. Tað havi eg so gjørt nú sigur Birgar, sum vónar at bókin verður væl móttikin.

Bókin, sum er umleið 110 síður, er ein myndabók við teksti, har lesarin fær gott innlit í hvussu býurin er broyttur hesa seinastu øldina.

Kápumyndin er ein oljumálningur, sum Christin Holm Isaksen (Kristin í Geil) málaði í 1917. Bókin er prentað hjá Estra og kostar 220 krónur.

*mg*




*Birgar Johannessen*







*Brot úr bókini. Hesar tíggjar myndirnar vísa hvussu Vaglið er broytt síðan 1922*

## †

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Fíu Toftgaard, Fuglafjørður**, fer úr Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin kl. 17. Jarðarferðin verður úr Fuglafjøðar kirkju leygardagin kl. 13.

**Elsa Maria Anthoniussen**, fødd Johannesen, ættað úr Klaksvík, **búsitandi í Esbjerg**, andaðist á sjúkrahúsinum í Esbjerg hósdagin 29 oktober, 66 ára gomul. Bønarhald verður á Nowrup kapell fríggjadagin 30 oktober kl. 13. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Ása Udbø, úr Havn**, fer til gravar frá Frelsunarherinum týsdagin 3. november kl. 13.00. Tey, ið vilja minnast Ásu við blómum ella kransi, kunnu ístaðin lata Frelsunarherinum í Havn eina peningagávu, konta í peningastovnunum

†

Kæra dóttir, mamma, omma og langomma okkara

**Ása Udbø**
úr Havn

fer til gravar frá Frelsunarherinum
týsdagin 3. november kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Julianna, Poula og Karstin við familju**

Tey, ið vilja minnast Ásu við blómum ella kransi, kunnu ístaðin lata Frelsunarherinum í Havn eina peningagávu, konta í peningastovnunum

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at

**Elsa Maria Anthoniussen**
fødd Johannessen
ættað úr Klaksvík
búsitandi í Esbjerg

andaðist á sjúkrahúsinum í Esbjerg
hósdagin 29.oktober, 66 ára gomul.

Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

### Dagurin

30. oktober. Absalon. Er navni á soni Dávids. Bíbilska navnið merkir faðir at friðinum.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

